## Hagstova Føroya

### Á Hagstovuni er eitt starv sum fulltrúi leyst at søkja

**Starvsinnihaldið**
Í høvuðsheitum er uppgávan at arbeiða við vinnuligum og øðrum búskaparligum hagtølum, sum liggja til grund undir ymsum uppgerðum.

Eitt nú til uppgerð av tjóðarroknskapi gera vit sonevndar deildarroknskapir fyri allar privatar vinnur, kommunurnar sum heild, landskassan og donsku statspartarnar í Føroyum. Starvið verður serliga at vera við í arbeiðinum við hesum deildarroknskapum, men kann saktans umfata aðrar hagtalsuppgerðir í sambandi við búskapin annars.

**Persónurin og útbúgvingin**
Brúk er tí fyri einum fólki við góðum innliti í roknskaparviðurskifti og skili fyri samfelagsbúskapi, sum dugir at arbeiða við mest vanligu telduforritum og sum ikki óttast at fara í holt við forriting. Tað er ein fyrimunur at kenna eitt sindur til forriting í SQL ella øðrum forritingarmáli, men ikki eitt krav kortini.

Hóast tað krevst at tú sjálvstøðugt ert førur fyri at loysa uppgávurnar tú fert at sita við, fert tú at hava tætt samstarv við aðrar búskaparfrøðingar, teldufyrisiting og skrivstovufólk á stovninum.

Til starvið krevst útbúgving sum cand.polit., cand.oecon., cand.merc. ella bachelor útbúgving í búskaparligum/fíggjarligum lærugreinum.

**Arbeiðsplássið**
Hagstovan er fyrst og fremst eitt víttfevnandi stað, har ið tú fært innlit í avgerandi og aktuell samfelagslig viðurskifti, tí umframt at lýsa samfelagið í regluligum uppgerðum, eru vit eisini við í lýsingini av øðrum aktuellum viðurskiftum, sum stinga seg upp. Alt sum vit framleiða av vitan og upplýsing er til at kunna borgararnar um, so at ein partur av flestu uppgávum er at hava samskifti við onnur.

**Løn og treytir annars**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag, og setanarøkið er fyrst og fremst Hagstovan, men eisini Fíggjarmálastýrið í síni heild.

**Umsóknarfreist og annað**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. mars 2000, og starvið skal verða sett so at byrjast kann í seinasta lagi 1. apríl 2000.

Nærri fæst at vita um starvið frá Hagstovuni tlf. 352028.



DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192



## Varaleiðari

Á stovninum Rókin undir Almanna- og Heilsumálastýrinum er eitt starv sum varaleiðari leyst at søkja frá 1. apríl 2000.

Talan er um fulltíðarstarv sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 20 + viðbót.

Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja starvið.

Rókin er ein bústovnur fyri børn og ung við atferðartrupulleikum.

Tað verður væntað av varaleiðaranum, at viðkomandi kann skapa trivna, kann átaka sær nýggjar pedagogiskar avbjóðingar, kann samstarva, hevur hugflog, kann seta greiðar linjur og er førur fyri at yvirtaka uppgávur fyristøðufólksins, tá hesin er burturstaddur.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðufólkið á tlf. 318914.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmælum v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 20. mars.

**Rókin**
Garðsgøta 31 • 160 Argir



### Barnagarðurin á Velbastað søkir eftir einum

## pedagogi

30 tímar um vikuna at byrja 1. apríl.

Eisini verður søkt eftir pedagogum at byrja 1. august ella eftir avtalu. Arbeiðstíð: 30–40 tímar um vikuna.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmálan millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Til starvið, sum verður sett 1. apríl, skulu skrivligar umsóknir vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 20. mars.

Barnagarðurin hevur eina vøggustovu við 10 plássum til børn millum 0 og 3 ár og eina barnagarðsstovu við 20 plássum til børn millum 3 og 8 ár. Opið er frá kl. 7.30 til 17.30.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til barnagarðin.

**Barnagarðurin á Velbastað**
176 Velbastað • tlf. 328121 • fax 328077
teldupostur: velbarn@post.olivant.fo



## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16


**TVINGSILSSØLA**

**Hósdagin tann 23. mars. 2000 kl. 09.15**
verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **ognina matr. nr. 1 v, Porkeri, (AS 56/99).**

Sambært eigaranum, er talan um eini sethús, bygd í november 1983 og eru húsini til støddar 123 $m^2$.

Húsini hava 3 hæddir:
Kjallari: Óinnrættaður, tó soleiðis, at ein partur av honum er garaga.
Miðhædd: Stova, køkur, gongd, wc, hjallur, umframt eitt rúm.
Loftshædd: 4 kømur, ein gongd og wc.

Sambært eigaranum hava húsini stoypta grund, veggirnir eru av timbri og takið av stáli.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Advokatfelagnum v/Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 43465-01),** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina, og sum avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsinssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 1. mars 2000*

**TVINGSILSSØLA**

**Hósdagin tann 23. mars. 2000 kl. 09.30**
verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **ognina matr. nr. 144 s, Trongisvágur, (AS 54/1999).**

Sambært tryggingarskjalinum er talan um eini sethús 134 $m^2$ í kjallara- og stovuhædd, gjørd av betong og takt við harðari tekju.

Stovuhædd: Stova, køkur, 3 kømur, 2 gangir, 2 baðirúm, grovkøkur, durur.

Kjallarahædd: Fýrrúm, vaskirúm og 1 kjallararúm.

Garður er stoyptur um ein part av grundøkinum.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Advokatfelagnum v/Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 43294-01),** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsinssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 1. mars 2000*

**TVINGSILSSØLA**

**Hósdagin tann 23. mars. 2000 kl. 09.00**
verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **ognina matr. nr. 413, Froðba, (AS 55/1999).**

Sambært eigaranum er talan um annað av einum dupulthúsum. Tað er bert vanligur veggur ímillum húsini. Húsini hava stoypta grund, og sambært tryggingarskjalinum eru húsini av timbri og takið takt við jarni.

Sambært ávíkavist tryggingarskjalinum og tingbóksattestini eru sethúsini til víddar 48 $m^2$ og grundstykkið 128 $m^2$.

Húsini hava tríggjar hæddir:
Kjallari: Óinnrættaður.
Miðhæddin: Stova, køkur og ein gongd.
Loftshædd: Gongd, toilet og tvey kømur.

Á grundøkinum uttan um húsini stendur ein hjallur.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Advokatfelagnum v/Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 43418-01),** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsinssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 1. mars 2000*

**TVINGSILSSØLA**

**Hósdagin tann 23. mars. 2000 kl. 10.15**
verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 266 Miðvág, (AS nr. 6/2000).**

Ognin er í tveimum hæddum, stovuhædd: Kamar, stova, køkur, wc, gongd. Kjallarahæddin: Kjallararúm við oljufýr og brúsu.

Stykkið er 294 $m^2$.

Húsini eru kløddd við plastik og takt við aluman.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Julionnu Klett, advokati, Bringsnagøta 15, 100 Tórshavn, tlf. 311744, (j. nr. 88.347),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 23. feb. 2000*



# Ferðslutrygd út á alnótina við nýggjari heimasíðu

*Ferðslutrygd er komið á Alnótina við sera spennandi heimasíðu*

Á heimasíðuni eru neyvar upplýsingar um Ráðið fyri Ferðslutrygd, bygnað og viðtøkur, ráðsfundir, starvsnevnd og limir tess.

Harnæst eru spennandi og upplýsandi síður um eitt nú rúsdrekkakoyring, umframt eina ungdómssíðu, har ungdómurin sjálvur kann gera viðmerkingar til mál í eina ungdómsbók.

Eitt spennandi tiltak er ein síða við ferðslutíðindum, harundir eru tíðindaskriv, sum verða uppdaterað hvørja viku. Hetta er nakað, sum ger tað lætt hjá bæði einstaklingum og kanska serliga fjølmiðlunum at fylgja við, hvat nýtt hendir á ferðsluøkinum.

Nógv rúmd er fyri 0-hugsjónini, har sera neyvar frágreiðingar eru um ferðslu og um hvat tiltøkini í 0-hugsjónini snúgva seg um.

Áhugaverd hagtøl og kanningarúrslit eru við hesum eisini løgd út á Alnótina.

Eisini er ein síða um samskiftið hjá RFF við skúlar, um undirvísingina og um Ferðsluring Barnanna, og seinast eru mong sera hent vevmið.




*Nýggja heimasíðan hjá Ferðslutrygd finst á adressuni www.rff.fo.*

## Kyrjasteinur

Bert níggju ára gamal var tá skip kom niðri frá,
stórhending fyri fuglfirðingar segði mangur tá,
stórsligin hendan skúta var í eygunum at sjá,
í bógnum tvar delfinir skornar, prýddu skútu.svá.

Tá eg var fjúrtan ára gamal fór eg fyrsta túr,
men havið fult av kavbátum sum lógu upp á lúr,
teir søktu heili túsund skip bert hetta eina ár,
so sigur søgan okkum nú, ja tíðin hon var svár.

Við Kyrjasteini fóru mangir føroyungar til lands,
tí ei var lætt hjá monnum við skipum fáa kjans,
við Kyrjasteini lastin full við fólkið pakkað var,
tó skipið sigldi vanda sjógv, tí eingin gav sar fær.

Ein triðing mistu føroyingar av skipaflotanum,
av minum ella kavbátum ur loftið flogførum,
men millum tey í undan sluppu Kyrjasteinur var,
og seinni sigldi mangan brattan hetta stolta farð,

Til Seyðisfjarðar Kyrjasteinur førdi manga last,
norðan frá til eysturlamdið hevði mangt eitt kast,
ørgrinna av sild ta var hon svam øll omaná,
og skip ei høvdu tílík tól sum henni søgdu frá.

Eg tjúgu ára gamal fór til Grønlands fyrstu ferð,
og leiðin gekk við Kyrjasteini millum ís og skerð,
vit níggju tjúgu setir høvdu lastin tók ei meir
til Ólavsøku náddu vit og gjørdu túrar. fleir.

Ein ódnarstorm á suðurlamdið mintist mangur á,
maskinkraftin so lítil var, ei sluppu landið frá,
at hjálpin tá úr erva kom ivast eingin í,
tí um hann ikki blíðkaði, teir bóru ei boð í bíð.

Men tíðin fór við Kyrjasteini sum við øllum her,
eikin øll nú fúna var, vit vita hvat tað ber,
í silvitni á Fuglafitði, eikin sundur stakk,
hann ongan góðan átti meir, og Kyrjasteinur sakk.

**Hans J. Hansen**

Viðmerking:

# »Limalisti almennur«

*Viðmerking til grein í »Krydd« 1. mars 2000*

Hesar reglur verða ikki skrivaðar, tí eg havi stórvegis hug at gera viðmerkingar til lítið virðiligu greinina »Limalisti almennur«, sum stóð at lesa í Krydd mikudagin 1. mars.

Um viðmerkingar skuldu skrivast til allar slíkar greinir, sum hetta óhefta blað prentar fyri tíðina, so hevði verið talan um fleiri heildagsstørv.

Sum limur í Unga Tjóðveldinum í Suðurstreymi kenni eg meg tó noydda til at kunna limir okkara, um at tað, sum stendur at lesa í Krydd, hevur sera lítið við veruleikan at gera. Limalisti Unga Tjóðveldisins liggur IKKI á Internetinum!!! Hann liggur har ikki nú, hevur ongantíð ligið har og fer heldur iki at gera tað í framtíðini. Tað, sum talan er um í teirri heldur torskildu greinini, er, at á heimasíðuni hjá Unga Tjóðveldinum hevur verið møguleiki at tekna seg sum lim í felagnum, men vit mugu tíverri ásanna, at vit ikki hava tryggjað okkum nóg væl ímóti teldusníkunum á Dimmalætting. Tað átaka vit okkum fulla ábyrgd fyri og vóna at tey sum hava teknað seg vilja umbera okkum hetta mistak. Tað fer ikki at endurtaka seg.

Teldukøn siga mær, at tað at (dulnevnd) fólk »biksa« soleiðis við heimasíður kann samanberast við, at postmaðurin vendir postkortinum og lesur tað. Eg haldi greinaskrivarin átti at hugsa seg sera væl um, áðrenn hann tosar um »ússaligt arbeiði«, men hereftir fara vit at hava í huga hesa óhepnu hending, so einki slíkt kann endurtaka seg.

Tað eydnaðist okkum í dag tíverri ikki at fáa orð á blaðstjóran á Krydd, meðan blaðstjórin á Dimmalætting umbar seg við, at hann hevði ikki skilt greinina?

Vónandi vilja tey tó rætta hetta mistak og í framtíðini blanda limir okkara uttanum teirra ríkisfelagsskapsstríð.

**Í Havn 1.3.2000**
**Vegna Unga Tjóðveldið**
**Ragnheiður Bogadóttir**


# Ráðstevna

*um kynsligan ágang móti børnum*

á Hotel Føroyum
27. og 28. mars

*Fyrilestrahaldarar bæði úr Føroyum og Danmark*

**Endamálið við ráðstevnuni er:**
- At seta fokus á seksuelt misnýtt børn
- At skifta vitan og royndir
- At fáa eitt fakligt kjak um, hvussu kynsligur ágangur móti børnum kann fyribyrgjast

**Málbólkur:**
Barnaverndir, lærarar, pedagogar, heilsusystrar/sjúkrasystrar, socialráðgevarar o.o. áhugað

**Kostnaður:**
*Báðir dagar íroknaðir*
***kr. 1.500,-***
við morgunmati og kaffi
*kr. 300,- eyka fyri døgurða mánakvøldið*

Peningurin skal gjaldast á konto:
9181 - 130 388 2

**Seinasta freist at gjalda er 10. mars 2000**

Teknið tykkum til ráðstevnuna og fáið fleiri upplýsingar við at ringja á tel 32 18 18 ella 31 95 43 millum kl. 18 og 21

team 85 • 31 65 11

**Barnabati**
Á Bryggjubakka 10 - Postsmoga 1052 - FO-110 Tórshavn
Tel/Fax: 31 63 31



JÄSPI KETLAR

*Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu*



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð. Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**

MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



sosialurin
-har tað hendir